


# ÚTBJÓÐING

## TOLLFRÍ SØLA Í VÁGA FLOGHAVN

Raksturin av virksemi við tollfríari sølu í Vága Floghavn verður við hesum alment boðin út av P/F Vága Floghavn.

Sáttmálaskeiðið skal ætlandi byrja í seinasta lagi 15. novembur 2008. Orsakað av bygging av nýggjum hølum til endamálið, kann sáttmálaskeiðið tó byrja seinni um byggiarbeiðið verður seinka. Sáttmálaskeiðið gongur út eftir tveimum árum at rokna frá einum mánaða áðrenn at tollfría sølan opnar, tó í seinasta lagi frá 1. novembur 2008. Møguleiki verður fyri at leingja sáttmálaskeiðið við einum árið afturat um semja er um hetta partanna millum.

**Útboðið fevnir um**
Útboðið fevnir um rættin til rakstur av tollfríari sølu frá tveimum handilshølum í Vága Floghavn; eitt fyri komandi og eitt fyri farandi ferðafólki.

Tey ið bjóða uppá rakstur av tollfríari sølu í Vága Floghavn skulu sum partur av sáttmálanum um rættin til tollfríu søluna leiga tey hølir, sum P/F Vága Floghavn veitir til endamálið, og øll tollfrí søla í Vága Floghavn skal fara fram frá teimum ávístu hølum. Tilboðsgevarar skulu sjálvir og fyri egna rokning stilla goymsluhølir til taks, sum uppfylla øll krøv frá TAKS fyri slík hølir.

Tollfríu sølubúðirnar í Vága Floghavn skulu verða opnar fyri sølu hvønn dag í vikuna í minnsta lagi frá kl. 08:00 til 20:00, og annars í samband við alla regluliga altjóða flúgving um Vága Floghavn, bæði við flogførum og tyrlum.

Útboðstreytirna eru nærri greinaðar í útboðstilfarinum, sum kann keypast frá P/F Vága Floghavn.

**Hvør kann bjóða**
Einstaklingar, feløg, samtøk ella aðrir juridiskir persónar, ið uppfylla krøvini í útboðstreytunum, og sum hava keypt útboðstilfarið frá P/F Vága Floghavn, kunnu lata inn tilboð. Um fleiri partar bjóða í felag (samtak) skal klárt verða tilskila hvønn av samtakspørtunum P/F Vága Floghavn kann føra møguligar samráðingar við.

**Hvussu fæst útboðstilfarið**
Útboðið verður almannakunngjørt á heimasíðuni hjá P/F Vága Floghavn (www.floghavn.fo) og í føroyskum fjølmiðlum tann 10. septembur 2008 og 12. septembur 2008.

Áhugaðir tilboðsgevarar kunnu fáa útboðstilfarið við at venda sær til P/F Vága Floghavn.

Áðrenn útboðstilfarið verður sent út til áhugaðar tilboðsgevarar, skulu kr. 10.000 rindast til P/F Vága Floghavn á konto nr. 6460 2018294 í Føroya Banka sum gjald fyri útboðstilfarið. Um P/F Vága Floghavn avlýsir útboðið, verður gjaldið afturgoldið.

**Freist at lata inn tilboð**
Boð, ið skulu verða galdandi í 90 dagar eftir at freistin fyri at lata inn tilboð er úti, skulu verða P/F Vága Floghavn í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 1. oktobur kl. 12:00 á skrivstovu felagsins:

P/F Vága Floghavn
Skrivstovan
Flogvøllurin í Vágum
FO-380 Sørvágur

Att.: Jóhannus Egholm Hansen, næstformaður

Boð skulu latast inn í fýra skrivligum eintøkum, umframt einum eintaki á CD-rom.

**Upplating av tilboðum**
Tilboð, sum eru móttikin rættstundis verða latin upp beint eftir at tilboðsfreistin er úti. Høvi verður ikki hjá einstøku tilboðsgevarunum at verða til staðar tá ið tilboðini verða latin upp.

Øll innlatin og upplatin tilboð verða viðgjørd í trúnaði.

Metingin av innkomnum tilboðum verður framd í tveimum umførum; útveljingarumfari, hvar mett verður um førleikar tilboðsgevarans, og tillutingarumfari, hvar ítøkilig meting verður framd einans av tilboðum teirra, sum eru mett at hava neyðugu førleikarnar at reka útbjóðaða virksemi.

**Tíðarætlan fyri útboðið**

| Freist/dagur | Evni |
|---|---|
| 10. septembur 2008 | Fyrsta kunngerð av útboðið |
| 12. septembur 2008 | Onnur kunngerð av útboðið |
| 22. septembur 2008 | Freist at seta fram skrivligar spurningar |
| 1. okt. 2008, kl. 12:00 (før. tíð) | Seinasta freist at lata inn tilboð |
| Vika 41 – 42 (mett) | Ætlandi fráboðan um val av tilboðsgevara |
| Vika 42 – 43 (mett) | Ætlandi undirskriving av sáttmála |
| Vika 47 – 48 (mett) | Sáttmálin kemur ætlandi í gildið og rakstur byrjar. |

Spurningar um útboðið og um útboðstilfarið kunnu vendast til Jóhannus Egholm Hansen, næstformanni í nevndini í P/F Vága Floghavn.

*Sørvágur, tann 8. septembur*
**NEVNDIN**

Alzheimerfelagið

Í septembur mánaði skipar Alzheimerfelagið fyri trimum almennum tiltøkum í sambandi við, at alheims Alzheimerdagur er tann 21.septembur. Øll tiltøkini verða kl. 19.30 í hølunum hjá Starvsmannfelgnum, J.H. Schrøtersgøta 9 í Havn



# TILTØK HJÁ ALZHEIMERFELAGNUM

*Orsakað av Alzheimers sjúku rekur Fiona (Julie Christie) longri og longri burtur frá hjúnafelagnum Grant (Gordon Pinsent). Mynd: Miracle Film Distribution.*

## Tann 29. septembur

**verður rættartrygdin hjá teimum, ið hava minnissvinn (demens), lýst og viðgjørd.**

Tiltakið verður skipað sum pallborðsfundur.
Við borðið sita:

- Sigmund Poulsen, løgfrøðingur.
- Jónvør Christiansen, sjúkrarøktarfrøðingur frá Heimavitjunartænastuni hjá Tórshavnar Býráði.
- Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í lógarmálum
- Hans P. Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum

Mánakvøldið tann 22. septembur verður filmskvøld:

## Away from her

**er heitið á filmi um eini hjún, har konan fær demenssjúkuna Alzheimers.**

Til staðar verða fólk við serútbúgving um demens, og eru fólk vælkomin at seta spurningar eftir sýningina.

**Kostnaður: kr 50,00, íroknað kaffi og køku.**

Hesin kanadiski kærleiksfilmurin er sjáldsama veruligur og viðkomandi.
Julie Christie leikar framúrskarandi í yndisliga filminum um gátuføru sjúkuna Alzheimers.
Hóast tey hava verið gift í 40 ár, eru samljóðið og hóskandi skemtið so inngrógvin, at tey bæði bresta útúr at flenna, tá ið hon setir pannuna inn í køliskápið eftir uppvaskið. Ella tá ið hon knappliga hevur gloymt, hvussu hann eitur, hasin leskiligi, reyði løgurin, ið rennur úr glasi og verður notin í hugnaligari samveru.
Men handan láturin og og minniligu skíðtúrarnar á kavaklæddu eingjunum við hugnaligu smáttu teirra lúrir óttin.
Filmurin er bygdur á stuttsøgu eftir Alice Munro, og hevur Sarah Polley, ið er einans 27 ár, leikstjórnað filmin - hennara 5. filmur.
Hóast evnið er minnissjúka, hýsir "Away from her" kenslubornar hendingar, lætt skemt, og ikki minst: sjúkunar álvari.

Tann 15. septembur er fyrilestur undir heitinum:

## Tá ið minnissvinn rakar familjuna

Hvat snýr tað seg um? Hvat er at gera, og hvat er í væntu? Hvussu tekur umhvørvið tað? Hvussu hjálpa vit best tí rakta/sjúka - og er gjørligt at varðveita sambandið og gevandi samskifti?
**SVAVA ARADÓTTIR**, sjúkrarøktarfrøðingur og ráðgevi frá fyritøkuni Nordic Lights innan minnissvinn, heldur fyrilesturin.
Fyrilesturin, ið verður á donskum, er fyri øll við áhuga í at vita meiri um minnissvinn og samskiftið við tey, ið eru rakt av minnissvinni.

sí: www.alzheimer.fo og www.nordic-lights.dk

Tórsbyrgi 16 | 100 Tórshavn | Tel. 31 31 02 | alzheimer@alzheimer.fo | www.alzheimer.fo